# Ferðaleiðaraskeið

Skeiðslýsing og námsskipan dagførd og galdandi frá 2024

Miðnám í Vestmanna
9. apríl 2024

## Innihald

1. Inngangur ........ 2
2. Endamál við skeiðnum ........ 2
3. Skeiðsskipan ........ 2
4. Útbúgvingarheiti ........ 3
5. Upptøkutreytir ........ 3
6. Skeiðsmál fyri læruúrtøku, bygnaður og innihald ........ 4
6.1 Læruúrtøka ........ 4
6.2 Bygnaður og innihald ........ 5
6.3 Fyrstuhjálparskeið ........ 5
7. Endalig verkætlan ........ 6
7.1 Lærumál við verkætlanini ........ 6
7.2 At skriva endaliga verkætlan ........ 7
8. Námsskipan ........ 7
8.1 Læru- og undirvísingarhættir ........ 7
8.2 Eftirmeting ........ 7
9. Avriksflutningur ........ 8
10. Dømiætlan ........ 8
11. Lestrarvegleiðing ........ 8

1.1. Fylgiskjal vísir læruætlan og sundurgreining av innihaldi í ymsu eindunum ........ 9
Partur 1. Vitan um Føroyar ........ 9
A.1 Eind 1 - Søga, samfelag og mentan ........ 9
A.2 Eind 2 - Søgulig forminnir, mentanararvur og føroysk list í stuttum ........ 10
A.3 Eind 3 - Føroysk náttúra og jarðfrøði ........ 11
Partur 2. Verklig og ástøðilig undirvísing – ráðlegging og miðlan ........ 12
2.1 Ferðavinna í Føroyum, túrdesign og upplivingar ........ 12
2.2 Staðkend fyrireiking av túrum ........ 13
2.3 Samskifti, frásøgukynstur og praktiskar venjingar ........ 14
Partur 3. Endalig verkætlan og próvtøka ........ 15

## 1. Inngangur

Ferðaleiðaraskeiðið er eitt yrkislagað skeið, sum Miðnám í Vestmanna (MIV) hevur boðið út síðani 2017, tá ið MIV fekk til uppgávu at menna førleikarnar hjá teimum, ið starvast ella ætla at starvast sum ferðaleiðarar. Skeiðið er grundað á fyrstu ferðaleiðaraskeiðini, ið vóru hildin í 2017-2020. Tillagingar eru gjørdar í skeiðinum við grundarlagi í eftirmetingum frá teimum, sum hava tikið skeiðið og einstøkum samrøðum við virkandi ferðaleiðarar. Soleiðis verður innihaldið mestsum óbroytt, men undirvísingarmátin meiri nútíðarhóskandi og í samsvari við upprunaliga tilmælið frá Mentamálaráðnum. Dagførda námsskipanin kemur í gildi við skeiðsbyrjan í august 2024.

## 2. Endamál við skeiðnum

Endamálið við ferðaleiðaraskeiðnum er at geva lesandi førleika til eftir lokið skeið at kunna virka sjálvstøðugt sum ferðaleiðari og vera við í tvørfakligum samstarvi. Gjøgnum menningargrundaða og yrkisliga tilgongd við støði í almennari vitan um Føroyar sum ferðamál, skal lesandi vinna sær førleika og hegni at virka sum sjálvstøðugur ferðaleiðari á túrum til gongu og í flutningsførum.

## 3. Skeiðsskipan

Skeiðið verður skipað sum skiftisskeið og er skipað í skeiðseindir, sum fevna um tilsamans umleið 200 undirvísingartímar. Undirvísingin fer fram í einum skúlaári sum kvøldundirvísing mitt í viku og útferðum og vitjanum í vikuskiftum.

3.1 Skeiðslongd: Skeiðið byrjar í august og endar í mai/juni árið eftir.

3.2 Tíðarskeið: Undirvíst verður 4 undirvísingartímar eitt kvøld um vikuna (kl.17.30 – 21.00), umframt verða umleið 8 útferðir gjørdar til søvn og ymisk atdráttarlig vitjunarstøð í Føroyum. Útferðirnar verða fyri tað mesta lagdar í vikuskiftum.

3.3 Útbúgvingarstaður: Undirvísingin fer fram á Miðnámi í Vestmanna.

3.4 Skeiðið gevur ikki rætt til avriksflutning til aðrar útbúgvingar, víðari lestur ella lestrarfyrireikandi yrkislagaða grundútbúgving.

3.5 Skeiðskostnaðurin: Kostnaðurin er 6.000 kr. fyri hvønn (íroknað lærubók og víðkað fyrstuhjálparskeið), og skal gjaldast skúlanum, áðrenn skeiðið byrjar.

3.6 Uppmøtingarskylda: Møtiskylda er til allar lisnar tímar á skeiðnum. Hetta er bæði galdandi fyri uppmøting til undirvísing í skúla, á útferðum, vitjanum á søvnum og aðrastaðni. Næmingur kann forsøma í mesta lagi 25% av samlaðu lisnu tímunum. Næmingur, sum ikki heldur møtiskylduna, sleppur ikki til próvtøku, og fær onki prógv. Hann er tó vælkomin at fylgja undirvisingini, sum hann hevur goldið fyri.

3.8 Broyting í undirvísingardegi: Skúlin kann avlýsa og flyta ætlaðu undirvísing og útferðir til annan dag av veðri, sjúku hjá lærara ella av øðrum orsøkum. Um luttakari ikki kann møta til undirvísing tær tíðir, tá broytingar eru, kann næmingur fylgja undirvísingini umvegis við fjarundirvísing, tá tað ber til. Hetta ávirkar tó ikki kravið um møtiskyldu til í minsta lagi 75% av samlaðu lisnu tímunum.

## 4. Útbúgvingarheiti

Skeiðið gevur teimum, ið hava staðið tað, rætt til at brúka heitið *Góðkendur Ferðaleiðari* og enska heiti *Certified Guide*.

## 5. Upptøkutreytir

Treytin fyri upptøku til skeiðið er, at umsøkjarin er fyltur 21 ár og hevur staðið eina viðkomandi útbúgving sum grundarlag fyri upptøku:

a) Gymnasialt miðnám
b) hevur málsligan førleika í einum ella fleiri fremmandamálum í minsta lagi á B-stigi ella hevur nomið líknandi málførleika. Fremmandamál eru at skilja sum øll mál, undantikin tey norðurlendsku málini danskt, svenskt og norskt.
c) Skilir føroyskt í skrift og talu.
d) Hevur fastan bústað í Føroyum.
e) í ávísum føri kann upptøka eisini játtast við støði í einari upptøkusamrøðu.
f) upptøka til einstakar skeiðseindir er treytað av, at pláss er á skeiðnum og at umsøkjarin frammanundan hevur góðkent ferðaleiðaraprógv.

Skúlin kann eisini taka upp næmingar við javnsettum førleikum og tilskilar sær rætt til at meta, um førleikarnir hjá umsøkjarum eru nøktandi.

# 6. Skeiðsmál fyri læruúrtøku, bygnaður og innihald

## 6.1 Læruúrtøka

**Vitan** – tann útbúni ferðaleiðarin hevur:

- eina menningargrundaða ástøðiliga og praktiska vitan um føroyska søgu, mentan, samfelag og broytingar, umframt interkulturelt samskifti og mentanarmiðlan í ferðavinnuhøpi
- eina fatan av ferðaleiðarayrkinum, brúk av ástøði og mannagongd, umframt
- eina menningarliga ástøðiliga vitan um yrkisliga hugleiðing og at brúka ástøði og mannagongdir, sum eyðkenna ferðavinnuna og upplivingarøki sum heild
- eina menningargrundaða ástøðiliga og praktiska vitan um fakøkið, við serligum denti á túrdesign og upplivingar

**Hegni -** tann útbúni ferðaleiðarin dugir at:

- brúka mannagongd og amboð og hevur hegnisligan førleika, bundin at mentanarmiðlan, serliga í ferðaleiðarayrkinum og upplivingarøki sum heild
- bera fram yrkisligar mannagongdir og fakligar spurningar og loysnir við samstarvsfelagar og brúkarar annars
- meta um praktiskar og ástøðiligar spurningar, umframt at grunda og velja sínamillum strategiskar loysnir í mun til málbólkin
- samskifta interkulturelt við ymsum persónligum framløguhættum

**Førleikar -** tann útbúni ferðaleiðarin dugir at:

- ogna sær menningargrundaða tvørfakliga vitan og menna hesa vitan
- handfara fjøltáttaðar og menningarligar støður í arbeiðshøpi
- sjálvstøðugt vera við í fakligum og tvørfakligum samstarvi og vísa ábyrgd í yrkisligum siðvenjukarmi
- menna sínar egnu førleikar

## 6.2 Bygnaður og innihald

Ferðaleiðaraskeiðið er sett saman av kravdum lærugreinum í tveimum skeiðspørtum umframt endaligari verkætlan. Skeiðini verða skipað sum verklig og ástøðilig undirvísing og fevna til samans umleið 200 undirvísingartímar. Undirvísingin verður í høvuðsheitum skipað sum floksundirvísing, sjálvlestur, uppgávur, lutaleikur og útferðir.

**Partur 1. Vitan um Føroyar**

| |
|---|
| Eind 1: Føroyar: Søga, samfelag og mentan<br>Eind 2: Søgulig fornminnir, mentanararvur og føroysk list í stuttum<br>Eind 3: Føroysk náttúra og jarðfrøði |

**Partur 2. Ráðlegging og miðlan**

| |
|---|
| Ferðavinna í Føroyum, túrdesign og upplivingar<br>Staðkend fyrireiking av túrum<br>Samskifti, frásøgukynstur og verkligar venjingar |

**Partur 3. Sjálvstøðug ráðlegging og fremjan**

| |
|---|
| Verkætlan |

Endalig verkætlan skal prógva, at tann lesandi hevur rokkið ásettu læruúrtøkuna. Evnið í verkætlanini skal vera innan fakliga øki og góðkent av skúlanum. Treytin fyri at fara til roynd í endaligari verkætlan er, at tann lesandi frammanundan hevur verið við og fullført allar undirvísingareindirnar.

## 6.3 Fyrstuhjálparskeið

Fyri at fáa endaligt prógv er tað eitt krav at hava staðið góðkent skeið í fyrstuhjálp, sum ikki er eldri enn 2 ár, tá ið ferðaleiðaraskeiðið er lokið. Skúlin samskipar fyrstuhjálparskeiðið við góðkendum veitara og er tað íroknað skeiðskostnaðin.

# 7. Endalig verkætlan

## 7.1 Lærumál við verkætlanini

Endamálið við endaligu verkætlanini er, at tann lesandi fær sameinað tær ástøðiligu, verkligu og menningargrundaðu eindinar við tí endamáli at loysa ein praksisspurning í verki. Endaliga verkætlanin hevur støði í einum praktiskum spurningi, har tann lesandi sum ferðaleiðari sjálvstøðugt skal vísa í verki, hvussu hann leggur til rættis, samlar vitan og avgreiðir ein túr við einum ferðabólki. Endaliga verkætlanin við fylgiskjølum skal mynda yrkisligu lærumálini í útbúgvingini og soleiðis geva tí lesandi:

**Vitan -** tann lesandi skal:

- kenna tey grundleggjandi krøvini til og fortreytir fyri miðvísari vitanarsavning, ið hevur týdning fyri at kunna fyrireika og fremja ein kvalifiseraðan ferðaleiðaratúr, lutvíst við at vísa grundleggjandi kunnleika um Føroyar og serstakliga tey lokalu viðurskiftini og umstøðurnar
- gjølla kenna eitt ávíst lokalt øki og seta mentanarlig støð og stovnar í ein umhvørvisligan, søguligan, mentanarligan, sosialan og búskaparligan samanhang

**Hegni -** tann lesandi skal:

- duga at leggja til rættis og fremja ein ferðaleiðaratúr til vitjanarmál, ið eru skipað eftir málbólki og tema
- duga at brúka logistiska strategi (flutningsmannagongd), og í tíð og rúmi handfara ein bólk av ferðafólki, so tey fáa sum mest burtur úr upplivingunum og samstundis gera tillagingar eftir umstøðunum
- duga at bera flótandi og natúrliga fram á tí málinum, ferðafólkini skilja
- brúka og grunda ymsa miðlatøkni, ið er knýtt at ferðaleiðarayrkinum, t.d. mikrofonteknikk, frásøgukynstur, væl vald tíð (timing) og tøkni annars, ið fylgir menningini av hesi yrkisgrein
- sum heild at meta um viðkomandi og ástøðiligar spurningar umframt at grunda og velja relevantar loysnir

**Førleiki -** tann lesandi skal**:**

- duga at skilja praksis, brúka ástøði og háttalag umframt at hugleiða um ferðaleiðarayrkið í sambandi við túrdesign og mentanarmiðlan
- duga at handfara fjøltáttaðar og menningarskipaðar støður í arbeiðs- og lestrarligum høpi
- sjálvstøðugt at fara upp í fakligt og tvørfakligt samstarv og taka ábyrgd í yrkisligari ferðaleiðara siðalæru
- kunna eyðmerkja egnan lærutørv og áhaldandi menna egnu vitan, hegni og førleika í sambandi við yrkið

### 7.2 At skriva endaliga verkætlan

Skúlin skal góðkenna uppgávuorðingina, áðrenn verkætlanin byrjar. Endaliga verkætlanin er ein einstaklingsuppgáva upp á 6 síður, har tann lesandi ger uppskot í synopsis um ein túr við ferðaleiðara. Verkætlanin kann eftir avtalu við vegleiðaran skrivast á enskum. Umframt sjálvstøðugt verkætlanararbeiði við vegleiðing eru verkstuðlandi lestrarvirksemi í skeiðstíðini, til dømis tað, ið verður nevnt niðanfyri, partur av endaligu verkætlanini.

- verkligar royndir við afturboðan
- verkligar venjingar í bussi ella til gongu við málsligari framgongd
- verkligar venjingar á rundferð á savni
- verkligar venjingar í øðrum yrkisligum ferðaleiðaralærugreinum, ið fylgja menningini í ferðavinnuni

Próvtøkan fevnir um munnliga próvtøku, sum tekur støðið í verkætlanin. Próvhoyringin varðir í 30 minuttir írokna próvdøming. Ongin fyrireikingartíð er. Próvhoyringin tekur støðið í framløgu prótakarans av verkætlanini og verður dømd eftir eini heildarmeting. Givið verður staðið/ikki staðið við støði í eini heildarfatan av avriki próvtakarans, verkætlanini og munnligu próvtøkuni.

## 8. Námsskipan

### 8.1 Læru- og undirvísingarhættir

Undirvísingin er skipað ávikavist sum floksundirvísing, fyrilestur, bólkaarbeiði, lutaleikur (rolluspæl) og útferðir. Undirvísingin tekur í størstan mun støði í ástøði og verkligum venjingum á skúlanum, og undirvísing við mentanarmiðlarum á ymsum atdráttaligum støðum og søvnum.

Umleið tríggir fjórðingar av allari undirvísingini er á skúlanum, og ein fjórðingur er á mentanarstovnum og søvnum, virkisvitjanir, í náttúruni og í flutningsførum við praktiskum venjingum.

Undirvísingin verður skipað sum skiftisútbúgving, ið er at menna sjálvbjargni, samstarvsevni og persónlig avrik hjá tí lesandi, umframt hegni at skapa fakliga endurnýggjan. Undirvísingarhættir fevna um sjálvstøðuga innsavnan av vitan, uppgávuloysn og sjálvlestri við sjálvstøðugari venjing á arbeiðsmáli.

### 8.2 Eftirmeting

Eftirmeting verður gjørd eftir hvørja eind við tí endamáli, at útvega svar frá teimum lesandi, hvat tey hava fingið burtur úr sínum upplivingum og úrtøkuni av skeiðnum. Svarini verða brúkt til at umrøða og ráðleggja komandi skeiðseindir og skeið sum heild.

## 9. Avriksflutningur

Eftir áheitan frá næmingi um góðkenning hevur leiðslan á skúlanum rætt til í hvørjum einstøkum føri at meta um avriksflutning. Grundarlagið fyri meting eru lidnar útbúgvingareindir frá aðrari føroyskari ella útlendskari framhaldsútbúgving. Avgerðin verður tikin við støði í eini fakligari meting um sama virði millum viðkomandi útbúgvingareindir og ferðaleiðaraskeiðið.

## 10. Dømiætlan

Skeiðsluttakararnir skulu til skriftliga roynd í skeiðspartið 1, tá hesin partur er liðugur. Við skeiðsenda, arbeiður hvør næmingur við eini sjálvvaldari endaligari verkætlan (heimauppgáva). Evnið til verkætlan skal frammanundan góðkennast av skúlanum, og krøv til verkætlan verða lýstar í nærri ásettum reglum í námsskipanini. Verkætlanin skal latast skúlanum í seinasta lagi 14 dagar undan seinasta skeiðsdegi og verjast til eina munnliga próvtøku við skeiðslok. Bæði skriftliga roynd og endalig verkætlan verður dømd staðið/ikki staðið.

Treytin fyri at fara til roynd í endaligari verkætlan er, at tann lesandi frammanundan hevur verið við og fullført allar undirvísingareindirnar. Til royndina í endaligu verkætlanini brúkar skúlin uttanhýsis próvdómarar, sum skúlin velur. Próvdómarar skulu hava neyva vitna og førleika innan ferðaleiðarayrkið. Próvskjal verður útflýggjað av útbúgvingarstaðnum.

## 11. Lestrarvegleiðing

Í samband við endaligu verkætlanina hevur hvør næmingur rætt til ein tíma vegleiðing.

## 1.1. Fylgiskjal vísir læruætlan og sundurgreining av innihaldi í ymsu eindunum

### Partur 1. Vitan um Føroyar

Eind 1: Føroyar: Søga, samfelag og mentan

Eind 2: Søgulig fornminnir, mentanararvur og føroysk list í stuttum

Eind 3: Føroysk náttúra og jarðfrøði

### A.1 Eind 1 - Søga, samfelag og mentan

**Innihald:**

- ástøðilig faklig vitan um føroyska søgu og samfelagsviðurskiftir (sosialt, politiskt og búskaparliga, sambandið við Danmark, Norðurlond og ES), stutt yvirlit yvir søguligar hendingar sum t.d. heimasýrislógin, flaggið og politiska skipanin (løgting og landsstýri) og ávirkanir á nútíðar samfelagið
- tvørfaklig vitan um føroyska málið og mentan (t.d. kvæði og dansur, ullin, báturin)
- ástøðilig vitan um gerandismentanina fyrr og nú
- ástøðilig vitan um búsetingarsøgu og gamlar byggihættir, livikorini, ættarbond og trúðarlív
- ástøðilig vitan um føroyskt vinnulív og føroyska lívsgrundarlagið

**Læruúrtøka eftir lokna eind:**

**Vitan -** tann lesandi skal:

- útvega sær menningarvenda og yvirskipaða vitan (fakliga vítt) í føroyskari søgu og samfelagsviðurskiftum (sosialt, politiskt, mentanarliga og búskaparliga) sambandið við Danmark, Norðurlond og ES), stutt yvirlit yvir søguligar hendingar, um ávirkanir á nútíðar samfelagsviðurskifti (heimasýrislógin, flaggið og politiska skipanin, løgting og landsstýri)
- ogna sær menningarvenda vitan um føroyska málið og mentan (kvæði og dansur, ullin, báturin)
- ogna sær vitan um føroyska vinnulívið og føroyska lívsgrundarlagið

**Hegni -** tann lesandi skal:

- duga at brúka tvørfakliga vitan og eyðmerkja tað serliga við Føroyum í sambandi við ymsar málbólkar og við atliti at førleikanum at greiða frá føroysku søguni og samfelagsviðurskiftum (sosialt, politiskt og búskaparliga) um sambandið við Danmark, Norðurlond og ES), um søguligar hendingar og um nútíðarsamfelagsviðurskifti (heimastýrislógin, flaggið, politiska skipanin, løgting og landsstýri)
- kenna sermerkt eyðkenni í føroyskari mentan (mál, kvæði og dansurin, maturin, ullina og bátin) og at brúka eyðkennini í umrøðu og kunna greiða frá almennum føroyskum viðurskiftum sammett við tey lond, haðani tey ferðandi koma
- duga at brúka hættir til at savna vitan og at endurnýggja tvørfakliga vitan um føroyska søgu, samfelag og mentan

**Førleikar -** tann lesandi skal:

- vera førur fyri at tulka eina søgu-, samfelags- ella mentanargongd ella hending í tvørfakligum og tíðarbundum samanhangi, umframt at byggja søgugongdina frá tí sermerkta til tað mest vanliga og at brúka søguligu vitanina í sosialari samvirkan við ymsar málbólkar
- sjálvstøðugt at kunna velja og brúka mannagongdir, ið lýsa serlig eyðkenni í søguhendingum, mentanarligum fyribrigdum og almennum samfelagsviðurskiftum í yvirskipaðan siðsøguligan samanhang

### A.2 Eind 2 - Søgulig forminnir, mentanararvur og føroysk list í stuttum

**Innihald:**

- Innleiðsla um føroysk fornminni (búsetingarsøga, byggihættir, fornleivdir), mentanararvur (matur og brúkslutir) við atliti at menningini í lívsgrundarlagnum í søguligum høpi
- serlig vitan um listasøguligt rák, og hvussu tað kemur til sjóndar í lutum, verkum og framførslum í listarligum høpi
- at duga at greiða frá um fornlutir og siðaarv

**Læruúrtøka eftir lokna eind:**

**Vitan** - tann lesandi skal ogna sær:

- ogna sær grundleggjandi ástøðiliga vitan um upprunan til serlig fornminni, og hvønn leiklut og týdning tey hava í nútíðar samfelagnum og matmentan
- ogna sær vitan um eyðkendar hendingar og viðurkendar persónar, ið hava serligan nútíðar týdning
- at lýsa í orðum og greiða frá listarligu menningini í høvuðsheitum

**Hegni** - tann lesandi skal:

- kunna brúka tvørfakliga vitan og eyðmerkja sereyðkennini við ymsum fornlutum, mentanararvi og mannagongdum, ið hava verið siðvenja í gerandisdegnum
- í høvuðsheitum at kunna eyðmerkja serligu eyðkennini í føroyskari list
- kunna meta um og brúka vanliga frásøgu um útbreiðslu av ymsum sereyðkennum og samanbera hesar lutir, tilburðir og gongd við nútíðina

**Førleikar** - tann lesandi skal:

- duga at velja, hvørji fornminnilig sereyðkenni hava havt týdning fyri samtíðina og at duga at greiða frá hesum
- kunna siga frá listasøguligum ráki í lutum, verkum og framførslum

### A.3 Eind 3 - Føroysk náttúra og jarðfrøði

**Innihald**:
- Gjøgnumgongd av føroysku jarðfrøðini og upphavi Føroya
- Yvirskipað grundleggjandi kunning um jarðfrøðiligu viðurskiftini
- Kunnleiki um føroysku náttúruna, gróður, plantur og djór (t.d. fisk, seyð, fugl, neyt)
- Kunnleiki um at gagnnýta djór og plantur í føroyskum mati
- Umhvørvispolitikkur og burðardygd

**Læruúrtøka eftir lokna eind:**

**Vitan -** tann lesandi skal:
- ogna sær yvirskipaða vitan um jarðfrøðiligu menningina og tíðarinnar tilgongd,
- ogna sær vitan um byrjanina og upprunatíðina í teimum týdningarmestu flágunum,
- ogna sær grundleggandi vitan um føroyska lívmargfeldið (biodiversitet),
- ogna sær vitan um tey kendastu plantu- og djórasløgini í Føroyum,
- ogna sær yvirskipaða vitan um umhvørvið og burðardygga framleiðslu.

**Hegni -** tann lesandi skal:
- kunna eyðmerkja, skilja og at miðla jarðfrøðiliga upprunan og landslagið sum heild,
- í høvuðsheitum kenna gróður og plantur í Føroyum,
- kunna eyðmerkja tey týdningarmestu djórasløgini, teirra lívmargfeldi og nýtslumøguleikar í føroysku matmentanini,
- kenna lógarásetingar um náttúruvernd og at friða djór, plantur, jarðfrøðilig fyribrigdi og at brúka náttúruna í sambandi við ferðavinnu.

**Førleiki -** tann lesandi skal:
- vera førur fyri at greiða frá upphavi Føroya og jarðfrøðiligu viðurskiftunum,
- duga at eyðmerkja og greiða frá teimum vanligastu djóra- og plantusløgunum og at gagnnýta tey í matmentanini,
- yvirskipað duga at greiða frá umhvørvispolitikki, burðardygd, náttúruvernd og friðing í sambandi við ferðavinnu.

## Partur 2. Verklig og ástøðilig undirvísing – ráðlegging og miðlan

1. Ferðavinna í Føroyum, túrdesign og upplivingar
2. Staðkend fyrireiking av túrum
3. Samskifti, frásøgukynstur og verkligar venjingar

### 2.1 Ferðavinna í Føroyum, túrdesign og upplivingar

**Innihald:**

- Ferðavinnan í Føroyum, aktørar og samfelagsligi týdningurin
- Innleiðandi kunning um upplivingarhugtakið og upplivingarøki
- Umhvørvið og burðardygg ferðavinna
- Rúmligar broytingartilgongdir í føroyskum ferðavinnuhøpi við atliti at høvuðsstaðarøkinum
- Design av upplivingum og túrtænastum
- Innleiðandi miðla- og mikrofonteknikkur og mentanarmiðlan í víðari merking
- Innleiðandi ferðaleiðarateknikk í bussi og á gongutúrum
- Framløgur og eftirmeting

**Læruúrtøka:**

**Vitan -** tann lesandi skal:

- ogna sær ástøðiliga vitan um føroyska ferðavinnu (faklig vídd) og samfelagsliga týdningin, umframt serliga vitan um fyritøkur, aktørar og tænastuveitarar, ið fevna um innkomandi ferðavinnu
- ogna sær ástøðiliga fatan av upplivingarhugtakinum í sambandi við, hvussu upplivingargrundaða mentanarmiðlanin kann hugsast inn í ferðavinnuhøpi
- ogna sær ástøðiliga vitan um hugtakið burðardygg ferðavinna í sambandi við ætlan fyri, hvussu vit kunnu betra lívskorini hjá fólki á staðnum, at betra samfelagsbúskapin og varðveita náttúruna gjøgnum burðardygga ferðavinnu. Her verður eisini hugt at, hvussu okkara grannalond og kappingarneytar gera við atliti at burðardyggari ferðavinnu, og hvussu kappingarfyrimunur fæst burturúr
- ogna sær ástøðiliga og praktiska vitan um design av túrtænastu til miðvísar málbólkar og at fáa innlit í viðkomandi kt-skipanir og amboð - frá hugskotsætlan til at avgreiða túrar
- ogna sær vitan og kunnleika til at fata og greina føroyska mentan í ymsum høpi, tíðarbundið
- ogna sær yvirskipaða ástøðiliga og praktiska vitan um mentanarmiðlan í ferðafólkahøpi við atliti at grundleggjandi ferðaleiðarateknikki á ymsum gongutúrum, í bussi og at røða um tað, sum er at síggja
- ogna sær vitan og mannagongd at hugsa samskiftishættir í ferðaleiðarahøpi

**Hegni -** tann lesandi skal:

- kunna eyðmerkja serligar málbólkar í frítíðar- og vinnuferðavinnu og kunna staðfesta, hvussu ein upplivingargrundað mentanarmiðling ítøkiliga kann skipast í túrproduktum á ávísum støðum í Føroyum
- kunna brúka tvørfakliga vitan um Føroyar og at staðfesta tað serliga við Føroyum í sínum túrdesigni (sum ferðafólk síggja tað)
- kunna lesa og tulka mentarnarlandslagið av við at dekonstruera tað sædda og m.a. seta tað inn í ymsan samtekst (t.d søguliga, vinnuliga, mentanarliga og sosialt)
- kunna hugleiða tær ymsu fasurnar (tíðarbundi) á einum túri frá hugskot í mun til málbólk og ítøkiliga fyrireiking og val av rutu og at greiða frá ymiskum á túrinum til verkliga fremjan
- kunna grundgeva og leggja fram eitt túrdesign fyri einum opponentliði og kunna geva feedback upp á túrdesign hjá øðrum lesandi í ferðavinnuhøpi

**Førleikar -** tann lesandi skal:

- í mennandi lærutilgongdini kunna brúka vitan og førleikar úr 1. skeiðsparti til at leggja til rættis og grunda túrdesign fyri einum málbólki í ferðleiðarahøpi,
- vera førur fyri at menna tíðarbundin og rúmsátt túrprodukt í ferðavinnuhøpi (hvat túrurin kann fevna um í tíð og stað),
- grunda tær ymsu fasurnar á einum túri frá hugskoti til ítøkiliga ætlan við atlit til málbólk, val av farleið(rutu), at siga frá støðum og lutum, til at fremja túrin í verki,
- duga grundleggjandi ferðaleiðara- og framløguteknikk á túrum,
- duga mikrofonteknikk til at miðla um Føroyar, og tað ið er at síggja á bussferðum,
- vera førur fyri at meta um uppskot, møguleikar og loysnir til túrdesign, bæði hjá sær sjálvum og hjá øðrum lesandi.

## 2.2 Staðkend fyrireiking av túrum

**Innihald:**

- Broytingar gjøgnum tíð og stað í tí ávísa økinum
- Staðbundna og yrkisbundna mentanarmiðling í ávísa økinum
- Økisferðavinna, aktørar og fyritøkur
- Trygd til gongu, í flutningsfari og á sjógvi

**Læruúrtøka:**

**Vitan -** tann lesandi skal:

- Ogna sær dagførda vitan um upplivingarmøguleikar og aðrar tænastur til ferðafólk í tí ávísa økinum
- Ogna sær vitan at skilja og tulka ta staðbundnu mentanina í ymsum høpi
- Ogna sær ástøðiliga og praktiska vitan um ta mentanarmiðlingina í ferðafólkahøpi við fokus á design og at fremja staðbundin og fakliga ásett túrprodukt
- Ogna sær vitan um leiðir og trygd til gongu, bygdum øki og flutningsfari

**Hegni** - tann lesandi skal:

- kunna avlesa og tulka mentanina við at dekonstruera tað sædda og m.a. seta tað inn í ymsan søguligan, vinnuligan, mentanarligan og sosialan samtekst
- kunna umseta vitan um broytingar til staðbundna mentanarmiðling í ferðafólkahøpi
- kunna hugleiða um tey ymsu stigini í einum staðbundnum ferðafólkatúri frá hugskoti og ta ítøkiligu ætlanina (málbólkur, samskiftisráðlegging, væl av leið og lutir í mentanar-miðlingini til at fremja túrin í verki)
- kunna brúka og greiða frá farleið og trygdarmannagongd hjá teim ferðandi

**Førleikar** - tann lesandi skal:

- kunna tulka lutir og tilburðir í økinum í tvørfakligum høpi – fakspesifikt og søguliga, og kunna siga frá bæði tí serstaka og til tað vanliga
- kunna velja ymisk evni og ymsar hendingar til serligar málbólkar og kunna grundgeva fyri sínum vali
- duga at praktisera og greið frá ferðafólkatrygd í mun til leiðir og umstøðurnar

## 2.3 Samskifti, frásøgukynstur og praktiskar venjingar

**Innihald:**

- Kunning um teori og mannagongd í retorikki, samskifti og miðlateknikki
- Persónligar framløgur í verki og rundvísing á mentanarstovnum
- Handfaring av bólkum og kunning um ferðaleiðarateknikk á túrum til gongu og akfari
- Kunning um mikrofonteknikk og at miðla evni yvirhøvur
- Praktisk venjing og miðling á túrum til gongu og í akfari

**Lærurúrtøka:**

**Vitan** - tann lesandi skal:

- Kenna tann retoriska pentagonin og aristoteliska appelformin í retorikki
- Kenna til skrivaðar og óskrivaðar reglur fyri bólkahandfaring á mentanarstovnum
- Útvega sær ítøkiliga vitan um teir mentanarstovnarnar, ið verða brúktir til venjing og royndir
- Stýra grundleggjandi ferðaleiðara- og miðlingarmannagongdum á gongutúrum
- Stýra mikrofonteknikki/taliteknikki til at kunna miðla evni yvirhøvur um Føroyar í dag og tær broytingarnar sum hava verið, við støði í tí, sum sæst á túrum í býum, bygdum og í náttúruni

**Hegni -** tann lesandi skal:

- Kunna velja út og miðla fakliga vitan við støði í tí, sum ferðafólk síggja
- Kunna miðla tað sædda og fara frá tí ítøkiliga til tað meira samanfatandi
- Kunna avrika, so at ein trúverd og sannførandi ferðafólkauppliving fæst burturúr
- Yvirhøvur duga at seta seg inn í og brúka ymsan miðlateknikk í ymsum høpi
- Kunna duga at vísa runt á einum mentanarstovni og brúka logistiska strategi, ið optimerar ferðafólkaupplivingina fyri ein ávísan málbólk

**Førleikar -**tann lesandi skal:

- Arbeiða málrættað við ræddar- og kropsmáli, so tey ferðandi fáa sum mest burturúr
- Duga at handfara og menna sín egna framførslustíl
- Menna førleikan til at vitja á mentanarstovnum í samsvari við galdandi sið og reglur í sambandi við ferðaleiðarayrkið
- Duga at skapa eina ferðafólkauppliving, tá ið høvi býðst

## Partur 3. Endalig verkætlan og próvtøka

Umleið 2 vikur áðrenn ferðaleiðaraskeiðið endar, skulu tey lesandi á skeiðinum sjálvstøðugt lata inn eina skriftliga synopsu fyri ein skipaðan túr.

**Tíðarætlan:** Vikuna frammanundan verður henda leiðbeining latin næmingunum. Arbeiðsvikan er 1 vika, og leiðbeiningin fer fram í hesi vikuni.

**Skrivlig synopsis**: Áðrenn næmingurin skal til munnliga próvtøku, skal hann lata skrivliga synopsis yvir túrin inn. Synopsan skal vera 6 síður og latast inn í seinasta lagi 7 dagar áðrenn ta munnligu próvtøkuna. Synopsis skal í punktformi vísa:

- Starttíð og byrjunarstað fyri túrin
- Stevnubólkur (aldur, kyn, tjóðskap, heilsuførleiki, útbúgving)
- Mál (ið verður brúkt á túrinum)
- Leið - ella rutuávísing
- Túralongd, sum vísir hegni yvir at halda eina tíðarætlan í minuttum
- Týðandi steðgistøð við evnum úr føroyskari náttúru, mentan, søgu, dýraríki og list, umframt ávísing av talutíð á hvørjum steðgistaði
- Týðandi steðgistøð við serligum denti á estetiskar upplivingar
- Endastað fyri túrin

**Mál**: Túrurin skal gerast á einum fremmandamáli (ikki donskum, norskum ella svenskum).

**Innihaldið av túrinum**: Í synopsis skal tí vera skillig ávísing av, hvar og nær tú vilt taka serlig evnisøki uppí, sum kanska ikki eru ein sjálvsagdur partur av túrinum. Tann skipaði túrurin skal fevna um allar lutir í skeiðnum. Høvuðsdentur skal vera á eitt av hesum 3 evnum, men kortini skal nakað við úr øllum trimum evnisøkjum.

- Føroysk søga, samfelag og mentan í mun til pensum
- Føroysk náttúra og djóralív í mun til pensum
- Føroysk list í mun til pensum

**Innihaldið í túrinum / Guideteknikkur**: Á tí skipaða túrinum skal næmingurin prógva, at hann hevur lært guideteknikk. Tað er, at næmingurin á túrinum skal vísa:

- At tað ber til at gera eina sannførandi vælkomu fyri gestirnar á túrinum
- At tað ber til at tosa so hart og týðiliga, at allir gestir hoyra ferðaleiðaran
- At fólk eru ílatin eftir umstøðunum
- At tú hevur fyrilit við veðri og vindi, so at gestirnir fáa tær best møguligu upplivingarnar
- At tað ber til at gera "walk and talk".
- At tað ber til at gera túrin uttanat, tó kann egið tilfar takast við, sum vegleiðing
- At tú kanst gera ein túr við hóskandi blanding av: læring, undirhaldi og estetikki
- At tú hevur skil á árstølum og tílíkum fakta
- At tú fylgir teirri ætlan, sum tú hevur skitserað í synopsis, sum tú hevur latið inn
- At tú ert tænastuhugaður, tað vil siga, at tú sum ferðaleiðari ert tilvitaður um tørvin hjá gestunum
- At tú fært gjørt ein sannførandi enda á túrinum

**Munnlig próvtøka**

Próvtøkan fevnir um munnliga próvtøku, sum tekur støðið í verkætlanini. Próvhoyringin varðir í 30 minuttir írokna próvdøming. Ongin fyrireikingartíð er.

Næmingurin:

- Næmingurin ímyndar sær, at próvførari og próvdómari eru ferðafólkini, og at tey í próvtøkustøðuni eru á túrinum (greiðir also frá ”live”)
- greiðir heilt stutt frá, hvør málbólkurin er, og hvar tey er stødd
- greiðir ”live” frá í 20 minuttir (10 minuttir á valda fremmandamálinum og 10 minuttir á føroyskum).
- Restin av tíðini er til spurningar og próvdøming.